Fróðskaparsetur Føroya

13. november 2007

## Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 8/2007

Tíð: Týsdagin 13. november 2007, kl. 13-15
Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Elin Súsanna Jacobsen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri SSD
Malan Marnersdóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Rúna Hjelm, setursskrivari frá 1.12.07
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 7/2007 setursráðsfundi 3. oktober 2007.**
Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarbýtið 2007, november 2007.** (J.nr. (3) 10-12-20070002). *Fundarskjal: Uppskot til fíggjarbýti, dagfest 12. november 2007, 11 síður.* Setursskrivarin gjøgnumgekk tølini og greiddi frá stóru forskjótingunum, sum eru hendar. Brúk er fyri hægri játtan til at fullfíggja innrættingina í Jónas Broncks gøtu. Neyðugt at raðfesta neyvt, hvørjar íløgur kunnu gerast afturat í 2007 Deildirnar skulu eftirkanna tølini og lata setursskrivstovuni endurskoðaðar fíggjarætlanir í seinasta lagi 23. november saman við einum raðfestum lista av íløgum, sum kunnu koma uppá tal, um fígging er til tess.

4. **Reglur og mannagongd fyri journalskipan og postmóttøku á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-00-20070004). *Fundarskjal: Uppskot frá Setursskrivstovuni, dagfest 22. oktober,12 síður.* Setursráðið tók undir við reglunum, eftir at ymsar orðingar vóru umrøddar. Samtykt at setursskrivarin og journalleiðarin skipa fyri kunningarfundi í november fyri øllum starvsfólkum um journalskipanina og reglurnar fyri hvat skal journaliserast og hvør hevur ábyrgd av hesum.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Reglur fyri goymslu av dátum.** (J.nr. (3) 10-80-20070005). *Fundarskjal: Uppskot frá KT-tænastuni, dagfest 9. november, 4 s.* Setursráðið fegnaðist um at reglurnar endiliga verða formaliseraðar og tók undir við uppskotinum til reglur, við tí fyrivarni, at uttanum umstøðurnar eru í lagi til hesar ásetingar. Her varð serliga hugsað um, at nokk av diskplássi er á felags skipanini og at hjálp fæst til at seta farteldur upp til at avrita á servaran, hvørja ferð tær verða knýttar í Traðarnetið. KT-tænastan fylgir málinum upp.

*6.* **Umsókn frá Turið Sigurðardóttur til *Grunn Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* um stuðul til at geva út aftur týðingar Janusar Djurhuus av fimm av dialogum Platons.** (J.nr. (3) 10-18-20070001). Tvær játtanir, sum eru latnar fyri fleiri árum síðani, eru falnar aftur í grunnin, tí bøkurnar ikki komu út sum ætlað. Tí eru kr. 20.000 tøkar í grunninum. Setursráðið helt hesa útgávuna hóska væl til endamál grunsins og játtaði kr. 20.000 í stuðli til útgávuna. Setursskrivstovan avgreiðir málið.

7. **Eldrapolitikkur á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-20-20070001). Málið reist í sambandi við kjak um, hvussu stovnurin skal skipa fyri, nú fleiri starvsfólk Fróðskaparsetursins nærkast eftirlønaraldri. Setursráðið er samt um, at tað er ynskiligt at fáa kjak í lag um fleiri starvsviðurskifti í hesum sambandi:
- hjá tí einstaka, sum nærkast eftirlønaraldri,
- tá fólk fara frá, men í samráð við stovnin ynskja at halda fram at granska og/ella undirvísa og vegleiða,
- hjá stovninum, sum skal seta nýggj fólk við, áðrenn ella samstundis sum onnur fara frá

Har afturat er átroðkandi tørvur meira alment at tosa um starvsviðurskifti í sambandi við undirvísingarpartin, m.a. møguleikan at hava skáa í undirvísingini til tess at savna seg um granskingina í styttri ella longri skeið.
Mett verður, at hetta eru viðurskifti, sum verða tikin upp í sambandi við komandi samanleggingina og tí verður hetta ikki tikið upp serstakt nú.

8. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundir á Føroyamálsdeildini 10.10.07 og 31.10.07. (J.nr. (3) 10-01-20070002).** Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 30.10.07. (J.nr. (3) 10-01-20070003).** Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

9. **Valnevndin** (J.nr. (3) 10-01-20070012):
   a. **Úrslitið av valinum 5.10.07 til megindeildarráðini gjørdist, at hesi fólk eru vald í megindeildarráðini fyri tíðarskeiðið 1.11.2007 – 31.10.2010, ella til nýggjur bygnaður er komin í gildi (studentaumboðini tó einans fyri lestrarárið 2007/08):**
      1.**Søgu- og Samfelagsdeildin:**

| | |
|---|---|
| Elin Súsanna Jacobsen | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Jóan Pauli Joensen | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Andras M. Mortensen | (vegna vísindastarvsfólk) |

| | |
|---|---|
| Eileen Vang | (vegna fyrisitingarstarvsfólk) |
| Gunnhild Dahl Niclassen | (vegna studentarnar) |
| Katrin Elisabeth L. Jacobsen | (vegna studentarnar) |
| Ólavur Christiansen, tiltakslimur | (vegna vísindastarvsfólk) |
| 2.**Føroyamálsdeildin:** | |
| Eivind Weyhe | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Malan Marnersdóttir | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Turið Sigurðardóttir | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Rannveig Winther | (vegna fyrisitingarstarvsfólk) |
| Randi Kúrberg | (vegna studentarnar) |
| Tóta Árnadóttir | (vegna studentarnar) |
| Kristin M. Magnussen , tiltakslimur | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Leina Reinert, tiltakslimur | (vegna fyrisitingarstarvsfólk) |
| Sigfríður Abrahamsen, tiltakslimur | (vegna studentarnar) |
| 3.**Náttúruvísindadeildin:** | |
| Hans Pauli Joensen | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Jim Brown | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Anna Maria Fosaa | (vegna vísindastarvsfólk) |
| Marjun í Túni Mortensen | (vegna fyrisitingarstarvsfólk) |
| Hannipoula Olsen | (vegna studentarnar) |

b. **Tá freistin at lata inn valevni til rektaravalið 2.11.07 var úti mánadagin 22. oktober, hevði bert Jóan Pauli Joensen stillað upp. Jóan Pauli Joensen er sostatt afturvaldur sum rektari fyri tíðarskeiðið 1.12.2007 – 30.11.2010, ella til nýggjur bygnaður er komin í gildi.**

c. **Aftaná megindeildarráðsvalið hava deildirnar skipað seg soleiðis við formonnum og næstformonnum. Á Føroyamálsdeildini er Malan Marnersdóttir formaður og Turið Sigurðardóttir næstformaður, á Søgu- og Samfelagsdeildini er Elin Súsanna Jacobsen formaður og Ólavur Christiansen næstformaður, og á Náttúruvísindadeildini er Hans Pauli Joensen formaður og Jim Brown næstformaður.**
**At staðfesta.**
Staðfest.

10. **Firouz Gaini hevur latið ritgerðina "Ungdómur – miðlar, mentan og seinmodernitetur í Føroyum" inn til Ph.D.verju. At góðkenna.** (J.nr. (3) 10-62.01-20070001).
Góðkent. Verjan er sambært avtalu við metingarnevndina ásett at vera 11. desember. Verjan verður í auluni í Jónas Broncks gøtu. Setursskrivstovan fyriskipar verjuna.

11. **Góðskriving. Setursráðið hevur millum funda góðkent góðskriving hjá Minu Reinert av grundútbúgving í enskum 120 ECTS frá Odense Universitet sum hjánám á M.A. í søgu. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-43.02-20070002).
Staðfest.

12. **Próvdómaragóðkenningar av metingarnevndum til Ph.D.verjur:**

a. **Søgu- og Samfelagsdeildin hevur biðið hesa metingarnevnd til verju av ritgerð hjá Firouz Gaini: Beinta í Jákupsstovu, lektari, Høgskolen i Molde, Gestur Guðmundsson, professari, Kennaraháskóli Íslands og Finnur Magnusson, dosentur, Malmö Högskola.**

b. **Náttúruvísindadeildin hevur biðið hesa metingarnevnd til verju av ritgerð hjá Una K. Petersen: Trine Dahl Jensen, fil.dr., GEUS, Keypmannahavn, Christopher Juhlin, professari, Universitetet i Uppsala og Dr. Philip Christie, Schlumberger Cambridge Research, Cambridge.**
**At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.

13. **Próvdómaragóðkenningar. Eftir tilmæli frá ávikavist Føroyamálsdeildini og Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent hesar próvdómarar:**
   a. **Jan Berg Jørgensen, cand.mag. í enskum og filmsvísindum, ráðgevi í samskiftisfyritøkuni ReproZ, til Samskifti**
   b. **Klaus Mosegaard, lektari, dr.scient., Niels Bohr Instituttet, Københavns Universitet, Innan Kolvetnisverkfrøði.**
   **At staðfesta. (J.nr. (3) 10-25-20070001).**
   Staðfest.

**Kunningarmál:**

14. **Mánaðarjavni ultimo oktober 2007, nýtsla fyri alt setrið 13.295.700 kr = 67,3% av játtanarkarmi uppá 19.749.000 kr.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).

15. **Starvsfólkamál:**
   a. **Helgi Iversen er nýggjur húsavørður á Stovnunum á Debesartrøð, hann kom í starvið 1. november 2007.** (J.nr. (3) 10-21.01-20070001 og (3) 10-22.01-20070014).
   b. **Rúna Hjelm er sett sum avloysari fyri setursskrivaran, hon byrjar í starvinum 1. desember 2007.** (J.nr. (3) 10-21.01-20070003 og (3) 10-22.01-20070016).
   c. **Eir í Ólavsstovu er sett sum kunningar- og samskiftisfólk, hon byrjar í starvinum 1. januar 2008.** (J.nr. (3) 10-21.01-20070002 og (3) 10-22.01-20070015).

16. **Frágreiðingar frá námsferðarstuðulsmóttakarum:**
   a. **Norbert Tóth, Ungarn, frágreiðing frá ferð í Føroyum í august í ár. Hann fekk námsferðarstuðul í ár. (J.nr. (3) 10-52-20070001).**
   b. **Rune Kristiansen, Århus, M.Sc.ritgerð ÅU august 2007 "Feeding ecology of pelagic juvenile cod (Gadus morhua) on the Faroe Plateau, 2000-2005". Hann fekk námsferðarstuðul í 2005. (J.nr. 0071-01392).**

17. **Útgávur:**
   a. **Nordiska bilaterala kulturfonder och föreninger, Tillkomst och verksamhet, Nanna Stefania Hermansson, Nordisk Kulturfond 2007.**
   b. **Frá norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi: Hagtøl um føroyskar útisetar, ein kanning um føroyskar útisetar í Danmark og Den nordatlantiske Gruppe, 6 år på Borgen.**

Frágreiðing: Annika Sølvará